


Island Duchess er nú umflagga frá hentleikaflagginum hjá Bahamas, til norskt flagg, fyri at bjarga arbeiðsplássum. Mynd: Island Offshore

# Hava ikki koyrt nakran heim hóast oljukreppuna

**Jógvan Hugo Gardar**

07.09.2015 - 09:53

Oljan.fo

Reiðaríið Island Offshore hevur ikki sagt eitt einasta starvsfólk úr starvi síðani oljuprísurin fór at lækka fyri góðum ári síðani. Norska reivaríið hevur umleið 1200 starvsfólk, og tey sum í vetur noyddist at vera heima eina tíð, tey eru øll komin aftur í arbeiði.

Reiðarin sigur at tey ynskja ikki at missa dugnalig fólk, sjálvt um marknaðurin er krevjandi, og tey flestu frálandareivaríini hava sagt upp fólk.

Í samrøðu við Maritime,no sigur stjórin í Island Offshore Management, Tommy Walaunet, at hóast ein kan spara nógv við at koyra fólk til hús í tíðum tá lítið er at gera, so kann tað gerast dýrari samanlagt, tá fólk skulu setast aftur tá meir verður at gera.

Island Offshore ger tí tað mótsatta av tí nógv onnur feløg í fralandavinnuni gera fyri tíðina. Reiðaríið hevur eisini valt at flagga heim eitt av skipunum hja sær til norskt flagg.

Tað er eisini ein óvanlig ger, nú tey flestu umhugsa at umflagga til hentleikafløgg fyri at spara enn meir pengar.

Í løtuni liggja eini 50 frálandaskip sum norsk reiðaríir eiga við teym.